UTTAN ÚR HEIMI

# Bush vil ikki hoyra orðið borgarakríggj



*Borgarakríggj ella ikki. Í hesum bilinum lá ein bumba, sum drap fleiri fólk í Bagdad*

*Mynd: Reuters*

**Hvítu Húsini royna av øllum alvi at forða fyri, at støðan í Irak verður umrødd sum borgarakríggj, tí eitt slíkt kann geva USA trupulleikar**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Í mínum eygum hava irakar lodda dýpið og eru komnir til ta niðurstøðu, at teir vilja ikki hava borgarakríggj.

Soleiðis svaraði George W. Bush, forseti, tá hann fyrr í vikuni bleiv spurdur, hvat hann helt um, at fyrrverandi irakski forsætisráðharrin Iyad Allawi hevur lýst støðuna í Irak sum borgarakríggj. Teir flestu serfrøðingarnir taka undir við Allawi. Aðrir siga, at støðan líkist so nógv borgarakríggi, at tað restar lítið í, til støðan kann lýsast við tí orðinum.

Men hjá Bush-umsitingini er tað sera umráðandi at forða fyri, at fjølmiðlarnir brúka okkurt annað orð enn borgarakríggj, sigur Monica Toft, sum starvast á strategiska stovninum á lærda Harward-háskúlanum.

– Brúka vit orðið borgarakríggj, merkir tað, at amerikanska átakið í Irak er miseydnað, og harafturat verður tann vanliga uppfatanin, at okkara hermenn og irakararnir eru falnir til fánýtis, sigur hon við útvarpið National Public.

Monica Toft leggur afturat, at verður støðan í Irak lýst sum borgarakríggj, fara fólk at seta spurnartekin við, hvat teir amerikonsku hermenninir gera har. Uppgáva teirra var at skipa Irak sum eitt demokrati, men tað ber ikki til at tosa um demokrati í einum borgarakríggi, sigur hon.

### Hvønn skal USA stuðla?

Fyrrverandi heryvirmaðurin Thomas X. Hammes, sum hevur skrivað eina bók um kríggj í 21. øld, heldur ikki, at tað ber til at tosa um rættiligt borgarakríggj í Irak, tí stjórnin í Bagdad situr enn. Hetta hevur serliga týdning fyri USA, sigur hann, tí hevði Irak onga stjórn, høvdu amerikanararnir komið í eina sera trupla støðu.

– Hvønn skulu vit stuðla, um tað endar við einum veruligum borgarakríggi? Onkran shiamuslimskan bólk? Ein sunnimuslimskan ella kanska ein kurdiskan, spyr Hammes í samrøðu við National Public-útvarpið.

# Halda fast um deyðadóm fyri umvending

**Afghanski forsetin lovart at verja Ahmed Rahman, men teir muslimsku prestarnir krevja hann dømdan til deyða fyri at hava tikið við kristnari trúgv**

AFGHANISTAN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært hægstarætti í Afghanistan kann tann 41 ára gamli Ahmed Rahman dømast til deyða, tí hann hevur tikið við kristnari trúgv. Málið hevur vakt stóran ans, og fleiri lond hava kravt, at maðurin verður latin leysur.

Kanadiski forsætisráðharrin, Stephen Harper, sigur seg hava fingið at vita frá Hamid Karzai, forseta, at Ahmed Rahman verður ikki tikin av døgum, og í gjár bað amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, afghanska forsetan síggja til, at málið fær eina góða loysn.

Men teir muslimsku prestarnir í Afghanistan lata seg ikki ávirka av trýsti uttaneftir.

– At venda sær frá Islam er at niðra Guð, og tað kunnu vit ikki góðtaka. Tí skal hesin maðurin lata lív, sigur presturin Abdul Raoulf við tíðindastovuna AP. Abdul Raouf verður mettur sum ein av teimum hóvligu andaligu leiðarunum í Afghanistan, men í hesum málinum er hann sera avgjørdur.

– Kappið høvdið av honum, sigur hann.

## Mira skal takast

Myndugleikarnir í Serbia kunngjørdu í gjár, at einkjan eftir Slobodan Milosevic, Mirjana Markovic, skal handtakast.

Mirjana Markovic, sum hevur búð í Moskva tey seinastu trý árini, er skuldsett fyri svik og valdsmisnýtslu. Í síðstu viku ljóðaði, at hon ætlaði sær til Serbia at fylgja manninum til gravar, men at hon var bangin fyri at verða handtikin, um hon kom. Myndugleikarnir gjørdu tí av at veita henni trygd fyri, at teir fóru ikki at taka hana, men hon kom ikki kortini.

Nú hava serbisku myndugleikarnir so kunngjørt handtøkuboðini so av nýggjum.

## Kanna norskar íløgur

Norska løgreglan hevur avgjørt, at tann serliga deildin, sum tekur sær av fíggjarligum brotsverkum, skal kanna viðurskiftini hjá nøkrum norðmonnum, sum hava gjørt íløgur fasta ogn í brasilska landspartinum Natal.

Kanningin verður sett í verk, eftir at tað er komið fram, at norskir brotsmenn og vinnulívbsmenn, sum eru farnir á húsagang, hava sett fleiri milliónir krónur í jørð og ymsar menningarætlanir í Natal.

Løgreglan í Brasil hevur eisini gjørt av at kanna viðurskiftini í samráð við teir norsku myndugleikarnar. Ætlandi skal brasilska løgreglan kanna virksemið í Brasil, meðan norska løgreglan skal kanna fortíðina hjá teimum, sum hava gjørt íløgurnar, skrivar ANB úr Oslo.

## Hægri aldursmark fyri giftu

Nú sleppa franskar gentur, sum eru yngri enn 18 ár, ikki at gifta seg. Tað hava tær annars havt loyvi til, síðani Napoleon ráddi fyri borgum fyri tveimum øldum síðani. Tá bleiv avgjørt, at gentur kundu giftast, so skjótt tær høvdu fylt 15, men at dreingir máttu bíða, til teir vóru vorðnir 18.

Hesar reglurnar hava verið í gildi higartil, men í gjár samtykti franska tjóðartingið at hækka aldursmarkið hjá gentunum til 18 ár, so markið er tað sama hjá báðum kynunum.

Politikararnir siga, at broytingin skal forða fyri, at gentur verða tvingaðar at gifta seg, og harafturat skal broytingin fyribyrgja harðskapi ímóti kvinnum. Myndugleikarnir vilja vera við, at í 2003 vórðu 70.000 ungar franskar gentur tvingaðar at gifta seg.

Við broytingini eru tær fronsku reglurnar tær somu sum í teimum flestu ES-londunum, skrivar AP úr París.

## Skiparin ikki ákærdur

Herfyri ljóðaði, at russiska ákæruvaldið hevði ákært skiparan á trolaranum ”Elektron”, tí hann rýmdi undan einum norskum sjóverjuskipi. Tveir norskir eftirlitsmenn vóru umborð á trolaranum, tá hann rýmdi.

Men skiparin er ikki ákærdur. Sambært Fiskeribladet er hann skuldsettur, men málið skal kannast betur, áðrenn møgulig ákæra verður reist ímóti honum. ”Elektron” er úr Murmansk, men tað er ríkisadvokaturin í St. Pætursbog, sum skal taka støðu til málið.

Norsku myndugleikarnir siga seg hava skilt, at russiski ríkisadvokaturin heldur tað vera serliga álvarssamt, at trolarin rýmdi við teimum báðum eftirlitsmonnunum. Hinvegin er ikki greitt, um skiparin verður ákærdur fyri ólógliga veiði.

Norska sjóverjan sigldi aftan á trolaranum, men teir báðir menninir sluppu ikki umborðaftur, fyrr enn ”Elektron” var komin í russiskan sjógv.